# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ungu flogbóltsmeistararnir

**Leygardagin var stóri finaludagurin hjá teimum ungu í flogbólti hildin í ítróttarhøllini í Trongisvági, har avgerandi dystirnir vóru um føroyameistaraheitini hjá gentum og dreingjum 14 ár, kvinnuunglingum og mansunglingum**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Flogbóltsdeildin hjá TB, sum saman við Flogbóltssambandinum skipaði fyri degnum, hevði spílað seg ordiliga út, so talan var um ein rættan finaludag, ið var rættiliga átøkur finaludegnum hjá teimum vaksnu.

Millum annað vóru allir dystirnir spældir á serliga Taraflex-gólvinum hjá Flogbóltssambandinum, og eisini var skipað fyri undirhaldi millum dystirnar, ið vóru millum liðini, sum gjørdust nummar eitt og tvey í kappingini, sum var í Havn leygardagin 28. februar.

Allir spælararnir blivu presenteraðir, tá teir ein og ein runnu inn á vøllin, og eftir hvønn dyst var besti spælari kosin. Somuleiðis vóru lokalir politikarar og stuðlar og handaðu steyp og heiðursmerki eftir hvørja finalu.

### Meistararnir

Fyrsta finalan var longu klokkan 10 millum kvinnuunglingarnar hjá Mjølnir og Fleyr, og her vann Fleyr 3-2 í einum spennandi dysti. Besti spælari í hesi finaluni var Rakul D. Jacobsen úr Fleyr.

Síðani spældu KÍF og TB finalu hjá gentum 14 ár, og her vann KÍF somuleiðis við einum fimmsettara, 3-2.

Í hesi finaluni var Marin Dimon úr TB kosin besti spælari.

Í finaluni hjá dreingjum 14 ár møttust so Mjølnir og TB, men her gjørdist tað ikki so spennandi, tí TB vann greitt 3-0. Somuleiðis átti TB besta spælaran í hesi finaluni, sum var Poul Ingason.

At enda stóð so finalan hjá mansunglingunum á skránni, og hon var millum SÍ og Fleyr, og her vann SÍ 3-1. Besti spælari í hesi finaluni var Brandur Heinason úr SÍ.



*Formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen, og borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, handa steyp og heiðursmerki*



*Føroyameistarar, kvinnuunglingar: KÍF*



*Føroyameistarar, mansunglingar: SÍ*



*Føroyameistarar, gentur 14 ár: KÍF*



*Føroyameistarar, dreingir 14 ár: TB*

# Fríðrún og Rógvi ársins spælarar

**Umleið 150 spælarar hugnaðu sær leygarkvøldið á stóru gallaveitsluni í Hoydølum hjá gentum 17 og dreingjum 17 í hondbólti. Hæddarpunktið var, tá tey bestu skuldu heiðrast.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Talan var um eina gallaveitslu í rætta stílinum, har tey ungu vóru pyntað og uppsnollað, og veitslan fyri spælararnar í deildunum gentur 17 og dreingir 17, sum H71 aftur í ár hevði tikið stig til, stóð lítið aftan fyri tað, vaksnu hondbóltsspælararnir eru vanir við, tá kappingarárið er at enda komið.

Forkvinnan í H71, Sunneva Jakobsen, bjóðaði øllum vælkomin, og so segði Anya Midjord frá Hondbóltssambandinum eisini nøkur orð. Eitt av innsløgunum, teimum ungu dámdi væl, var Finnur Jensen, sum við gittara og sangi undirhelt veitslugestunum.

Tá maturin frá Hvonn var fingin niðurum, var tíðin kom til spennandi løtuna, tá tey bestu í hetta kappingarárið skuldu heiðrast. Sum rosinan í pylsuendanum kom so heiðurin til tey bæði, sum vóru kosin ársins spælarar: Fríðrún Danielsen úr StÍF og Rógvi Sørensen úr H71.



*Rógvi Sørensen úr H71 og Fríðrún Danielsen úr StÍF vóru leygarkvøldið kosin ársins spælarar ávíkavist í deildunum gentur 17 og dreingir 17 í hondbólti*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

## Ársins bestu 2008/09

**Ársins stjørnuskot**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Birita Mortansdóttir, Kyndil |
| Dreingir 17: | Mikkjal Hansen, Neistin |

**Ársins verjuspælarar**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Fríðrún Danielsen, StÍF |
| Dreingir 17: | Sjúrður Nielsen, VÍF |

**Ársins málverjar**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Silja í Liða, Neistin |
| Dreingir 17: | Mikkjal Hansen, Neistin |

**Ársins álopsspælarar**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Fríðrún Danielsen, StÍF |
| Dreingir 17: | Magnus Müller, VÍF |

**Ársins venjarar**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Marian Cirloganescu, StÍF |
| Dreingir 17: | Danny Syhler, H71 |

**Ársins spælarar**

| | |
|---|---|
| Gentur 17: | Fríðrún Danielsen, StÍF |
| Dreingir 17: | Rógvi Sørensen, H71 |